## VIÐMERKINGAR

# Barsilsskipan í andgletti

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Landsstýrismaðurin í vinnumálum legði í vikuni fram uppskot um munandi broytingar í verandi barsilsskipan. Broytingar, sum í stóran mun undirgrava endamálið við skipanini. Broytingar, ið Tjóðveldisflokkurin ikki fer at taka undir við.

**Endamálið við barsilsskipanini**

Endamálið við barsilsskipanini er at tryggja, at familjur ikki hava fíggjarligan miss tá mamman og/ella pápin fara í barsil í samband við barnsburð. Tí verður 100% lønarendurgjald latið í barsilstíðini.

Eisini er endamálið at tryggja, at kvinnur á privata arbeiðsmarknaðinum fáa somu barsilstreytir sum kvinnur á almenna arbeiðsmarknaðinum. Og hartil er endamálið m.a. at geva familjum møguleika at velja, hvørt mamman ella pápin skulu verða heima hjá barninum eftir 14. viku eftir barnsburð.

**Uppskotið úr Vinnumálaráðnum undirgrevur skipanina**

Men uppskotið til broytingar frá vinnumálaráðharranum undirgrevur høvuðsendamálini við skipanini.

Eitt nú er í uppskoti at lækka útgjaldið úr 100% í 90% av lønarinntøkuni. Hetta rakar øll tey, ið starvast á privata arbeiðsmarknaðinum, tí tey alment løntu eru tryggjaði 100% lønarendurgjald umvegis sáttmálar. Hetta skapar eina ójavnvág og órættvísi.

Eisini verður skotið upp, at pápar, ið fáa part av barsilstíðini hjá mammuni, ikki fáa lønarendurgjald, men fáa gjald roknað út frá lønarinntøkuni hjá mammuni. Hetta vil forða fleiri familjum fíggjarliga í at velja, hvørt mamman ella pápin eru heima hjá barninum eftir 14. viku eftir barnsburð. Harvið er valið ikki frítt.

Eisini verður skotið upp av vinnumálaráðharranum, at kvinnur ikki kunnu fara í barsil upp til 13 vikur undan barnsburð, um hesar gerast sjúkar. Hereftir skulu tær undir dagpeningaskipanina, og fáa harvið munandi minni útgoldið.

Hetta eru allar broytingar, ið eru við til at undirgrava endamálið við barsilsskipanini.

**Tá heldur fremja hesar broytingar: a) Hækka inngjaldið**

Higartil hevur kostnaðurin av skipanini verið býttur millum arbeiðsmarknað og landskassa. Men í framtíðini skal skipanin fíggjast av arbeiðsmarknaðinum, eins og ALS. Hetta fer at krevja at inngjaldið hækkar. Hvussu nógv veldst um, hvussu stórt útgjaldið skal verða. Men verður talan um at hækka inngjaldið eitt nú úr 0,25% uppí 0,5%, gevur hetta um 30 mió. meira í inntøkum frá arbeiðsmarknaðinum. Harvið fær skipanin um 60 mió. kr. at arbeiða við.

Havandi í huga at ALS gjaldið er lækkað við 0,5% í ár (lækkaði úr 1,25% í 0,5% og síðan hækkað til 0,75%), vil ein øking av barsilssgjaldinum við 0,25% helst ikki verða ein stór byrða fyri partarnir á arbeiðsmarknaðinum.

**b) Velja millum 6 og 9 mdr.**

Tá farast skal undir broytingar í skipanini, hevði tað verið upplagt at gjørt nakrar betringar í barsilsskipanini. Eitt nú at nýtt høvið at givið foreldrum valmøguleika millum styttri og longri tíðarskeið. Ein møguleiki kundi verið, at givið foreldrum møguleika at velja millum 36 vikur (9 mdr.) við 80% lønarendurgjaldi og 24 vikur (6 mdr.) við 100% lønarendurgjaldi - sum nú. Útgangsstøðið eigur at verða 100% lønarendurgjald, men ynskja foreldur eina aðra loysn hevði tað verið gott um møguleiki varð fyri hesum.

**c) Foreldur frælsi at velja**

Í dag kunnu foreldur frá 14. viku eftir barnsburð velja, hvørt mamman ella pápin eru heima, og fáa lønarendurgjald frá barsilsskipanini. Hetta frælsið eigur sjálvsagt ikki at verða skert - um nakað so víðkað.

**d) Møguligar avmarkingar**

Skulu avmarkingar gerast fyri at avmarka útgjaldið kundi ein loysn verið at lækka lønarendurgjaldsloftið á 35.000 kr. niður í 25.000 kr um mánaðan.

Somuleiðis kunnu treytir setast fyri, at pápin fær part av barsilstíðini hjá mammuni. Soleiðis at skilja, at í dag kunnu pápar fara í barsilsfarloyvi við fullari løn, hóast mamman er heimagangandi og heima hjá barninum. Hetta hevur helst ikki verið upprunaliga ætlanin við skipanini. Ætlanin er hinvegin at tryggja, at eitt av foreldrunum kann verða heima hjá barninum uttan at missa lønarinntøku. Tí kundu treytir verið settar, ið tryggja at henda meginreglan verður hildin.

Børnini eru størsta tilfeingi Føroya

Nógv verður í hesum døgum tosað um tilfeingi, serstakliga føroyska tilfeingið í sjónum. Men ongin ivi skal verða um, at børnini eru virðismiklasta og størsta tilfeingið, ið Føroyar eiga - nú og í framtíðini.

Tað er tí okkara uppgáva at fremja ein barna- og familjuvinarligan politikk - og at geva børnunum so góða byrjan sum møguligt - og hetta er m.a. ein góð barsilsskipan við til at tryggja.

# Beinleiðis álop á øll loysingarfólk

**Jógvan Jacobsen**
*landsnevndarlimur Unga Tjóðveldisins*

*Dimmalætting skrivar í grein í dag, 7. novembur 2003, um Lisbeth L. Petersen. Greinaskrivarin leggur landasviksákærur í munnin á øllum loysingarfólki í Føroyum. Dimmalætting vil ikki geva nakra umbering.*

Greinin byrjar á forsíðuni. Hon heldur síðani fram á síðu 4. Undir yvirskriftini *"Høvdu ikki ráð til niðurskurðin"* stendur hetta:

**Nógv loysingarfólk vilja óiva ákæra Lisbeth L. Petersen fyri landasvik, tí tey meina at hon brúkar sín fólkatingssess og limaskap í Vinstra til at spenna bein fyri fólkavalda meirilutan í Løgtinginum, ið ynskir, at Føroyar gerasr sjálvstøðugar. Harvið halda nógv, at hein eisini spennir bein fyri fólkaræðinum.**

Greinaskrivarin, Uni L. Hansen, setur spurnartekin við hvørt Lisbeth L. Petersen hevur rætt til at gera, sum hon ger á danatingi. Greinaskrivarin fer enntá so langt sum at spyrja um Lisbeth L. Petersen fremur landasvik.

Men greinaskrivarin fer ov langt í hesum sambandi. Hann leggur hesi ivamálini í munnin á føroyskum loysingarfólki. "Nógv loysingarfólk", "óiva", hesi orðini verða brúkt til at spilla ein stóran part av Føroya fólki niður í sand og ósku. Ein meiriluta av Føroya fólki.

Sum nevndarlimur í Unga Tjóðveldinum - felag teirra ungu, ið fylkjast á frælsisleið - kann eg ikki góðtaka slíka niðurgerð. Skulu fólk endurgevast fyri at hava sagt okkurt, so skulu tey eisini hava sagt tað. Greinaskrivarin ger seg eisini til talsmann fyri tankarnar hjá loysingarfólki. Eg kundi hugsað mær at vita hvørjar førleikar greinaskrivarin hevur til tess.

Eg sendi eina klagu til Dimmalætting í gjár, 6. novembur 2003. Eg havi fingið aftursvar í dag, 7. novembur 2003.

Í svarinum fái eg at vita at loysingarfólk í Føroyum fáa onga umbering frá Dimmalætting. Júst orðingin "nógv loysingarfólk" verður brúkt sum grundgeving fyri at talan ikki er um øll og at pástandurin tískil er í lagi.

Men hetta er ikki nøktandi. Greinaskrivarin leggur tankar í høvdið og orð í munnin á øllum loysingarfólki í Føroyum.

Hetta er at fara um mark og tað við lít. At eitt tíðindablað skal avgera hvat fólk hugsa og ikki er ikki á lagi.

# So varð linjan løgd av Óla Jacobsen

**Randi í Jógvanstovu**

Út til høgru við teimum, ið ikki vóru føroysk.

Einans føroyskt er nóg gott, tað skal varðveitast fyri ein hvønn prís, kosta hvat tað vil: Eitt kann eg siga tær, tað kann blíva dýrt fyri føroyingar og Føroyar.

Føroysk arbeiðsmegi hevur verið væl móttikin í øðrum londum, eisini uttan fyri tey norðurlendsku londini, gjøgnum nógv ár. Kann meir enn so henda at tú har legði ein snávingarstein og ikki hissinistein.

Tá harðast leikaði á undir kreppuni seinast, arbeiddu út við 600 føroyskir handverkarar uttanlands. Teir vóru ikki einans í norðurlondum, men eisini í Týsklandi, Polen o.s.fr. Túsundtals føroyingar sigla við skipum heimahoyrandi í øðrum londum. Havi ikki frætt, at teir skuldu verið settir í starv, sum treytar, at teir skulu gyppast fyrst, tá ið á stendur. So frætt av virðing hevur man so víst teimum.

Her er øðrvísi. Her er ikki nokk at vera ein arbeiðari, tað »nationala« skal eisini vera í lagi. Tá tynnast skal út, er ikki nokk at tú hevur røkt tínar skyldur mótvegis samfelagnum: Rinda tín skatt, røkt tínar skyldur í fakfelagnum, borið teg teg væl at millum tínar starvsfelagar o.o. Tú hevur eitt álvarsamt brek, og har bøtist ikki, tú ert ikki føroyingur. Har er einki at gera, tú ert seldur til stonglakress, og sum tú kanska veit, ert tú eins og lakress júst í hesum døgum, vøra, sum var vigað og funnin ov løtt. Annar tykkara var áløgd skatt, tú vart útgyppað, so gongur tað jú upp ella?

Eitt nemt offur stakkalin, men higani er linjan løgd, her er eingin ið talar tína søk fremmandi. Her er eingin slingur í valsinum. Einans føroyskt er nóg gott.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Burðatalið er grundarlagið undir fólkavøkstrinum

**Burðatalið í Føroyum er høgt, og fer hetta at vera høvuðsgrundarlagið undir fólkavøkstrinum komandi árini. Tað er alneyðugt at skapa karmar fyri framhaldandi høgum burðatali, metir Hans Pauli Strøm, samfelagsfrøðingur**

DEMOGRAFI
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

**Fólkavøkstur**

| | 2003 | 2008 | 2013 | 2018 | 2023 | 2028 | 2033 | 2038 | 2043 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-24 | 17.623 | 18.499 | 18.894 | 18.728 | 19.142 | 19.684 | 20.167 | 20.596 | 20.753 |
| 25-64 | 23.743 | 24.961 | 26.004 | 27.348 | 28.272 | 28.758 | 28.625 | 28.650 | 29.029 |
| 65++ | 6.338 | 6.732 | 7.528 | 8.532 | 9.349 | 10.208 | 11.189 | 11.633 | 11.752 |
| Tils. | **47.704** | **50.192** | **52.426** | **54.608** | **56.764** | **58.650** | **59.982** | **60.879** | **61.533** |

*Soleiðis metir Hagstova Føroya gongdin í fólkatalinum í Føroyum verður næstu fjøruti árini*

Føroyskar kvinnur eru raskar at føða børn. So raskar eru tær, at hetta gevur føroyska samfelagnum ein fyrimun í mun til onnur lond tey næstu árini.

Tosað verður ofta um eina komandi eldrabumbu, har sipað verður til, at talið av eldri fólkum í føroyska samfelagnum eins og í londum rundanum Føroyar fer at veksa

Men Hans Pauli Strøm, samfelagsfrøðingur, stúrir ikki so nógv fyri júst hesum. Orsøkin er, at burðatalið í Føroyum, ella fertiliteturin, er høgur. Ja, hægri enn í okkara grannalondum.

## Eingin bumba brostin

Tosað hevur verið um eina møguliga eldrabumbu. Her verður sipað til, at gongdin í Føroyum og í øðrum londum er, at tey eldri enn 65 ár ella pensjónistarnir veksa í stórum tali, og hinir samfelagsbólkarnir illa kunnu fylgja við.

Men Hans Pauli Strøm, sum dagligt starvast á Hagstovu Føroya, heldur ikki, at vit skulu óttast nakra hvøllan brest í næstum. Orsøkin er serliga høga burðatalið í Føroyum.

- Støðan í Føroyum er øðrvísi enn í okkara grannalondum. Vit hava stóran innflyting av fólki, og burðatalið í Føroyum er høgt, sigur Hans Pauli Strøm.

Burðatalið í Føroyum var í 2002 uppgjørt til at vera 2,540. Bert Grønland av hinum Norðanlondunum hevði eitt burðatal omanfyri tvey. Tað merkir, at føroyskar kvinnur føða børn til bæði seg og makan, og yvirskot er til at økja um fólkatalið. Sviar og danir hava eitt burðatal, sum er ávíkavíst 1.639 og 1,725.

- Tað er eitt øgiliga heppið fyri føroyska samfelagið, at vit hava so stórt burðatal, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað er sjálvsagt at høgt burðatalið ikki skapar nakran fólkavøkstur, um eitt land hevur eina nettoútflyting av fólki, t.e. fleiri fólk flyta burtur enn flyta til landið.

Hetta gjørdi seg galdandi í Føroyum í kreppuárunum miðskeiðis í nítiárunum. Av teimum mongu, sum fluttu burtur tá eru langt frá øll komin aftur. Hetta fær Hans Pauli Størm at halda, at potentialið fyri framtíðar fólkavøkstri er stórt.

## Nógv fleiri

Í talvunum, sum sæst á hesum síðum, sæst, at Hagstova Føroya roknar við, at 4.722 fleiri fólk fara at búgva á teimum átjan føroysku oyggjunum um tíggju ár. Hetta svara til ein fólkavøkstur áljóðandi tíggju prosent. Um tjúgu ár búgva sjeytjan prosent fleiri fólk í Føroyum í mun til í dag. Tá er fólkatalið í Føroyum 56.764 fólk. Í 2033 búgva 59.982 fólk í Føroyum, og um fjøruti ár verður mett, at 61.533 kunnu kalla seg fastbúgvandi í Føroyum.

Hetta er ein markantur fólkavøkstur, sum er væl størri enn aðrar framrokningar hava víst á. Framrokningar rokna ikki við nakrar samfelagsligari kreppu ella nýggjari stórvinnu, sum heilt broytir eftirspurningin eftir arbeiðsmegi.

Tað mest áhugaverda er kortini, hvussu býtið í samfelagnum verður komandi árini.

Hans Pauli Strøm sigur seg rokna við útfrá verandi støðu, at góða burðatalið fer at halda seg røttu megin tvey, og framvegis geva ein sunnan fólkavøkstur. Men Hans Pauli Strøm hevur eisini gjørt eina fólkatalspyramidu, um burðatalið í Føroyum lækkar so við og við niður til talið í hinum Norðurlondum.

Fólkapyramidan í løtuni í Føroyum er størst í botninum. Tann størsti aldursbólkurin eru tey millum tíggju og fjúrtan ár. Hetta gevur eitt gott grundarlag til tey næstu árini.

Heldur gongdin við burðatalið og tilflytan fram, so vísir pyramidan hjá Hans Paula Strøm og Hagstovu Føroya ein javnan fólkavøkstur í flest øllum aldursbólkum. Tey eldri enn 65 gerast eisini fleiri, men vøksturin hjá fólki í skúlaaldri og á arbeiðsmarknaðinum er stórur.

Komandi tjúgu árini veksur talið av teimum millum 20 og 64 ár við 5.359 fólkum, og talið av fólki eldri enn 65 ár veksur við 3.011. Hetta er ikki nakað, sum fær Hans Paula Strøm at óttast, tí hann metir at fortreytirnar eru góðar fyri at varðveita somu vælferðartænastur




*Hendan talvan vísir gongdini í talinum av fólki 65 ár og eldri í Føroyum. Tølini frá 2003 og fram eru framrokningar hjá Hagstovu Føroya.*




*Umframt støðuna í dag síggjast her 2 alternativ, hvussu støðan kann blíva um 30 ár. Støðan A er tann, sum er mett eftir framrokningini við einum framhaldandi høgum føðitíttleika, hóast hann minkar nakað. B vísir støðuna, um føroyski føðitíttleikin í hesi 30 ár minkar niðar á sama lága miðaltalið, sum nú er galdandi fyri Norðurlond. Tølini til høgru eru mannfólk og til vinstru eru konufólk. Tað sæst týðuliga, hvønn týdning burðatalið hevur*

við hesum fólabýtinum. Tey eldri enn 65 fylla eini trý prosent meira av samlaða fólkatalinum í um tjúgu ár, enn tey gera nú.

Føroysk mannfólk munnu sum heild finna seg í, at tað verður eins torført og áður at finna sær eina maka millum føroysku kvinnurnar, tá ið tað í flest øllum aldursbólkum verða fleiri menn enn kvinnur.

## Mugu halda fast

Hin pyramidan, B, vísir, hvussu gongdinvið einum lægri burðartalið verður mett at vera. Hon vísir, at eldru aldursbólkarnir gerast upp ímóti eins stórir og teir yngru. Eitt nú verður talið av teimum í aldrinum 65-69 størri enn talið av børnum millum 0 og 4 ár.

-Tann størsta avbjóðingin komandi árini verður at halda fast við høga burðatalið. Støðan í løtuni er ikki so ring, sum siga hana vera, men tað verður neyðugt í framtíðini at skapa karmar fyri, at tað løna seg sum best hjá fólki at fáa sær børn, sigur Hans Pauli Strøm.

Seinastu tíðina hevur verið frammi, at gera munandi broytingar í barnsburðarskipanini. Hetta er

- Øll tiltøk, sum skapa verri fortreytir fyri verandi og komandi barnafamiljur, hava negativa ávirkan á føðitíttleikan. Verri fíggjarligur umstøður í samband við barnsburð fara at enda við einum lækkandi føðitíttleika. Og tað gevur upp á longri sikt eina "gamla" fólkasamanseting, og harvið fíggjarligar trupulleikar hjá tí almenna við øllum vælferðarskipanunum, sigur Hans Pauli Strøm.

Eisini serfrøðingar síggja ikki eins ljóst upp á framtíðina sum Hans Pauli strøm við høgum burðatalið. Boðskapurin hjá Hans Paula er, at støðan er góð nú, og eldrabumba er brostin ella fer at bresta sum gongdin er nú, men neyðugt er við greiðum politiskum málum at halda verandi gongd.